# Hoyringsskriv til uppskot um broyting í pensjónsskipan

*Eftir at hava móttikið uppskot um broytingar av teimum trimum lógunum, ið hava við pensjónsøkið at gera, sendir Havnar Arbeiðskvinnufelag hervið sínar viðmerking til Almannaráðiðið og Fíggjarmálaráðið.*

Sambært uppskotinum fara flestu pensjónistar at fáa meira at liva fyri. Flestu giftir pensjónistar fáa kr 1.080 meira at liva fyri mánaðarliga ella meira og flestu stakir pensjónistar fáa eisini kr 1.080 meira at liva fyri mánaðarliga. Hetta eru pensjónistar, ið eru undir verandi skipan. Tað vil siga pensjónistar, ið longu eru farnir av arbeiðsmarknaðinum ella sum fara av arbeiðsmarknaðinum seinni í ár. Hyggja vit eftir sokallaðu 2020-pensjónistunum síggja vit, at myndir líkist. Flestu pensjónistar fáa meira at liva fyri.

Sum nevnt, er talan um flestu pensjónistar. Hetta merkir, at tað eisini er ein bólkur, ið ikki fær somu øking í keypiorkuni sum hini. Fyri gifta og staka pensjónistin er talan um tey, ið hava eina lága egin inntøku. Havnar Arbeiðskvinnufelag vil nýta hetta høvið, at heita á samgonguna at bera so í bandi, at tað ikki verður ávísur partur av pensjónistunum, sum á hendan hátt gerast taparar av pensjónsuppskotinum, sum nú er lagt fyri dagin. Berið so í bandi, at eisini hesin partur av pensjónistum fær somu øking í keypiorkuni, sum hini.

Í "gomlu" ætlanunum um nýggja pensjónsskipan var greitt, at fólkapensjónin og mótrokningarmørkini skuldu prístalsviðgerast. Hetta hevur alstóran týdning fyri fólkapensjónistin, tí prístalsviðgerðin tryggjar, at øktir livikostnaðir sjálvvirkandi verða innroknaðir í fólkapensjónina. Á hendan hátt misti pensjónisturin ikki keypiorku. Í verandi uppskoti er ógreitt, hvussu verður við hesi prístalsviðgerð. Havnar Arbeiðskvinnufelag heitir tí á samgonguna um at tryggja pensjónistum hesa sjálvvirkandi prístalsviðgerð av fólkapensjónini, soleiðis at pensjónisturin ikki verður merktur neiliga av øktum livikostnaði og øktum lønarlagi hjá øðrum samfelagsbólkum.

Fólkapensjónin hevur fleiri veitingar, men serliga er vert at leggja til merkis, at grundupphæddin og viðbótin er lægri til gifta pensjónistin enn til staka pensjónistin. Havnar Arbeiðskvinnufelag metir ikki, at hetta er rætt. Havnar Arbeiðskvinnufelag metir tað verða skeivt, at pensjónistur skal revsast av at vera giftur og felagið mælir tí til, at tað ikki verður skilt ímillum um pensjónistur er giftur ella stakur. Allir pensjónistar skulu viðfarast eins og fáa somu upphæddir útgolda óheft av hjúnarstøðu.

Broytingin í skatting av pensiónum gerð, at kommununar missa skattainntøku. Hetta ger at pensionistar á stovni, verða fyri vanbýti.

Havnar Arbeiðskvinnufelag vónar, at hesar viðmerkingarnar verða tiknar til eftirtektar.

Tórshavn 15/11-2019

**Vegna Havnar Arbeiðskvinnufelag**
Vigdis Johannesen, forkvinna